# Setrið leggur lunnar undir føroyska oljuvinnu

**Útbúgvingarsøga varð skrivað, tá fyrstu kolvetnisverkfrøðingarnir fingu prógv síni á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya mikudagin**

ÚTBÚGVING OG OLJA
*Jan Müller*



*Kolvetnisverkfrøðingarnir eru: Regin Joensen, Brian Dahl Kristensen, Øystein Patursson, Eivind Hentze Samuelsen, Hallur Stakksund og John Zachariassen. Ravmagnsverkfrøðingurin er Jóan Petur Petersen.*

*Mynd Jens Kr. Vang*

– Vit skriva útbúgvingarsøgu í dag, har fyrstu kolvetnisverkfrøðingarnir fáa prógv frá Fróðskaparsetrinum segði Hans Pauli Joensen, megindeildarleiðari á Fróðskaparsetri Føroya, tá hann mikudagin handaði sjey nýggjum verkfrøðingum prógv – einum í ravmagnsverkfrøði og seks í kolvetnisverkfrøði. Náttúruvísindadeildin hevur útbúgvið ravmagnsverkfrøðingar síðan fyrst í 1990-unum, men kolvetnisverkfrøði er harafturímóti nýtt evni á Setrinum.

Universitetsútbúgvingar eru skipaðar ymiskt ymsa staðni í heiminum. Hjá okkum og í londunum uttan um okkum er vanligt, at tær eru skipaðar í trimum stigum. Innan náttúruvísindi og tøkni er ein vælkend gongd fyrst 3-3,5 ár til BS (Bachelor of Science), síðan 2 ára framhald til MS (Master of Science) og at enda 3 ár til PhD (Philosophia Doctor). Øll trý stigini geva starvsførleika.

Náttúruvísindadeildin hevur ymiskar BS-útbúgvingar á skránni, og tær taka 3 ella 3,5 ár. Trý ára útbúgvingarnar eru í lívfrøði, matvørufrøði, teldufrøði/-kunningartøkni og jarðalisfrøði. Av hesum hava tey seinnu árini bert havt umstøður at bjóða útbúgvingina í lívfrøði. 3,5 ára útbúgvingarnar eru verkfrøðingaútbúgvingarnar í ravmagnsverkfrøði og kolvetnisverkfrøði. Lýst er júst eftir studentum til eina spildurnýggja BS-útbúgving í kunningartøkni, ið er skipað sum 2,5 ára hálvtíðarlestur oman á datamatikaraútbúgving frá t.d. Føroya Handilsskúla, og sum byrjar eftir summarfrítíðina í ár.

Verkfrøðingaútbúgvingarnar á Náttúruvísindadeildini eru samskipaðar soleiðis, at lesturin tey bæði fyrstu árini er at kalla eins. Har eru felags lærugreinir í støddfrøði, teldufrøði, alisfrøði og tekniskum grundgreinum. Seinastu 1,5 árini er lesturin púra ymiskur, tí tá koma sergreinirnar inn í myndina. Seinasta hálva árið fara 70-80% av lestrartíðini til at arbeiða við eini seruppgávu, har studentarnir fáa høvi til at brúka vitan, ið teir hava nomið sær í teimum mongu lærugreinunum, ið teir tá hava lagt aftur um seg. Miðað verður eftir, at seruppgávurnar verða gjørdar í samstarvi við stovnar og virki uttan fyri Fróðskaparsetrið, og tað hevur borið væl til.

## Ravmagnsverkfrøði

Í ravmagnverkfrøðiútbúgvingini verður dentur lagdur á evni sum viðvíkja bæði traditionellum og aktuellum evnum. Nevnast kunnu t.d. datasavning og dataviðgerð, signalviðgerð, stýritøkni og fjarskifti. Hetta eru týðandi tættir í m.a. elorkuskipanum, skipanum í fiski- og alivinnu og í tveimum av mest aktuellu vinnugreinunum, nevniliga kolvetnis- og KT-vinnu. Ravmagnsverkfrøði fevnir breitt um framleiðslu og tænastuvirksemi í samfelagnum og í vinnulívinum.

Evnið í seruppgávuni hjá Jóan Petur Petersen, ravmagnsverkfrøðingi, er signalviðgerð í samband við digital hoyrihjálpartól. Her ræður um at skilja frá og viðgera tann partin av ljóðum og óljóðum uttan um okkum, sum er tala, tí tað er jú tann parturin, sum brúkarin av hoyrihjálpartólinum tørvar. Í seruppgávuni hevur Jóan Petur Petersen hugt nærri eftir ymiskum hættum (algoritmum) til avdúking av talu, og hann hevur í hesum sambandi vitjað og fingið fakligan stuðul frá donsku fyritøkuni Oticon, ið útviklar og framleiðir hoyrihjálpartól. Jóan Petur fer 18. apríl 2002 kl 19:00 at halda fyrilestur um evni í síni seruppgávu.

## Kolvetnisverkfrøði – hvussu byrjaði tað?

Í røðu síni til nýggju verkfrøðingarnar vísti Hans Pauli Joensen á, at broyttar samfelagsligar vinnufortreytir føra við sær tørv á nýggjum útbúgvingartilboðum. – Her hugsi eg um eina komandi kolvetnisvinnu í føroyskum sjóøki. Ein kolvetnisvinna hevur m.a. tørv á kolvetnisverkfrøðingum, og Fróðskaparsetrið hevur lagt dent á at fáa útbúgving av kolvetnisverkfrøðingum í lag so tíðliga, at teir fyrstu verkfrøðingarnir skuldu verða útbúnir, tá ein kolvetnisvinna fór at taka seg upp við Føroyar.

Fyrireikingarnar byrjaðu í 1996. Í november hetta árið fekk Náttúruvísindadeildin vitjan av Høgskolen i Stavanger, og samráðingarnar førdu seinni til, at Náttúruvísindadeildin og Institutt for Petroleumsteknologi á Høgskolen i Stavanger undirskrivaðu samstarvsavtalu 26. februar 1997. Í Stavanger hava tey trý ára útbúgvingar til »høgskoleingeniør« og 5 ára útbúgvingar til sivilverkfrøðing. Samstarvsavtalan gekk m.a. út upp á, at studentar frá Náttúruvísindadeildini skuldu kunna halda fram at lesa kolvetnisverkfrøði á Høgskolen i Stavanger, bæði til »høgskoleingeniør« og til sivilverkfrøðing innan kolvetnistøkni.

Men tey vildu nakað meira á Setrinum. Tey ynsktu at skipa eina sjálvstøðuga útbúgving í kolvetnisverkfrøði á Náttúruvísindadeildini. Tað gjørdist møguligt í 1998, og tað eru fyrstu kandidatarnir við hesi nýggju útbúgvingini, sum nú fingu pógv.

Fyrstu tvey árini av kolvetnisverkfrøðiútbúgvingini eru samskipað við ravmagnsverkfrøðiútbúgvingina, so tað vóru tey seinastu 1,5 árini, ið serstøk námsskipan skuldi gerast fyri. Partar av kolvetnisverkfrøðiútbúgvingunum á Høgskolen i Stavanger vóru havdir sum fyrimyndir, men dentur varð alla tíðina lagdur á, at útbúgvingin á Náttúruvísindadeildini skuldi byggja á ta útbúgvingarskipan, ið var á staðnum frammanundan.

Seinastu 1,5 árini vórðu skipað við sergreinum, sum eitt nú snúgva seg um jarðfrøði, boritøkni, brunntøkni (reservoirtøkni), veskumekanikk og um olju- og gassframleiðslu. Dentur er eisini lagdur á at geva verkfrøðingunum innlit í føroyska og altjóða oljulóggávu og búskap, og tí er eitt sertakt skeið um hetta við í útbúgvingini. Útbúgvingin endar við eini seruppgávu, sum serritgerð skal skrivast um, og tær fyrstu serritgerðirnar eru nú lidnar.

## Nýklaktu kolvetnisverkfrøðingarnir

Kolvetisverkfrøðingarnir hava gjørt sínar seruppgávur hjá Statoil og Rogalandsforskning í Stavanger, og hjá DONG í Danmark. Hans Pauli Joensen vísti á, at tað hevur verið áhugavert og læruríkt hjá teimum at kunna arbeitt við seruppgávunum undir slíkum umstøðum. Kolvetnisverkfrøðingarnir eru 6 í tali: Regin Joensen, Brian Dahl Kristensen, Øystein Patursson, Eivind Hentze Samuelsen, Hallur Stakksund og John Zachariassen. Teir hava gjørt seruppgávur um boring og oljureservoir.

Tað er sera umráðandi, ikki minst fyri eitt lítið universitet sum Fróðskaparsetur Føroya, at útbúgvingarnar standa altjóða krøv. Tað leggja tey stóran dent á eisini í verkfrøðingaútbúgvingunum. Støðið verður tryggjað m.a. við at brúka próvdómarar frá útlendskum universitetum, tí harvið verður tað javnan samanborið við støðið á tilsvarandi útbúgvingum aðrastaðni. Samanberingarnar vísa, at útbúgvingarnar hjá okkum standa fult mát við aðrar. Hetta sæst t.d. aftur í, at tey, ið velja at taka framhaldandi útbúgvingar til sivilverkfrøðing á útlendskum universitetum eftir lokið prógv á Fróðskaparsetrinum, klára seg bæði skjótt og væl gjøgnum lesturin. Lærarar hava eisini verið fólk frá Jarðfrøðissavninum og øðrum stovnum. Hans Pauli Joensen takkaði teimum og øllum, sum hava gjørt tað møguligt at røkka so langt. Hann takkaði eisini oljufeløgunum, sum hava stuðlað. Tá tey løgdu kolvetnisútbúgvingina til rættis var eingin játtan til tað. Men her komu oljufeløgini okkum til hjálpar. Fyrst Atlantic Margin Group, ið vóru oljufeløgini Statoil, Mobil og Enterprise, og síðan Statoil-bólkurin, sum er Statoil, Phillips, Enterprise og Veba Oil. Feløgini sýndu áhuga fyri útbúgvingarætlanunum, og tey gingu saman um at fíggja starvstovuútgerð og lærarakreftir til tess at Setrið kundu útbúgva fyrsta liðið av kolvetnisverkfrøðingum. Oljufeløgini hava somuleiðis fíggjað allar uppihalds- og ferðaútreiðslur hjá kolvetnisverkfrøðingunum í samband við serritgerðirnar, sum gjørdar vórðu í Noregi og í Danmark. Hans Pauli Joensen takkaði teimum fyri henda vælvilja. Og at enda takkaði hann nýggju verkfrøðingunum. – Tað hevur verið hugaligt at hava teir her, serliga tí teir hava klárað seg so avbera væl. Eg skal ikki fara í smálutir, men tó avdúka, at prótølini fyri seruppitgerðirnar hjá teimum geva eitt miðaltal upp á heili 11,4. Tað sigur ikki so lítið.

*Hans Pauli Joensen, um nýggju verkfrøðingarnar: – Tað hevur verið hugaligt at hava teir her, serliga tí teir hava klárað seg so avbera væl. Próvtølini fyri seruppitgerðirnar geva eitt miðaltal upp á heili 11,4. Tað sigur ikki so lítið. Her er hann saman við næmingum í Nóatúni.*

*Mynd Jan Müller*





# Eiler ongar ætlanir um at selja Sólborg

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*– Eg havi ongar ætlanir um at selja Sólborg, sigur Eiler Jacobsen, reiðari*

Seinastu tíðina hava søgur gingið um, at Eiler Jacobsen, reiðari, ætlar at selja rækjuskipið, Sólborg, men hetta er eftir øllum at døma ikki so.

– Hatta veit eg avgjørt einki um, sigur Eiler, sum læandi heldur fyri, at fjølmiðlarnir so ofta bæði hava keypt og selt skip fyri hann og aðrar.

Eiler sigur, at Sólborg í løtuni er á Flemmish Kap. Teir hava fiskað í eina góða viku, og fiskiskapurin hevur ligið um 8-10 tons um dagin.

– Hetta er hampiligur fiskiskapur, men rækjurnar eru smáar, og rækjuprísurin er ov lágur.

Reiðarin vísir á, at prísurin á teimum smáu rækjunum, teimum sonevndu sekkjarækjunum, er hækkaður einar 2 kr. kg., og hetta ger mun.

– Men líkt er ikki til, at japanesarar vilja geva meira fyri tær stóru rækjurnar.

Hann heldur, at orsøkin er hon, at aðrir í størri mun eru komnir á japanska marknaðin við sínum rækjum.

Undan hesum túrinum var Sólborg í Eysturgrønlandi.

Eiler sigur, at hetta var ein hampiliga góður túrur í nøgd, men eisini her var prísurin á rækjunum til Japans ov lágur.

Rækjurnar hjá Sólborg vórðu lagdar upp í Havn; sekkjarækjurnar endaðu á Oyri, meðan tær stóru rækjurnar fóru til Japans.

## Gongur væl hjá Krúnborg

Vit spurdu eisini Eiler, hvussu tað hevur gingist hjá Krúnborg. Onkur mundi yppa øksl, tá ið okkara kendasti reiðari fyri fáum árum síðan undirskrivaði sáttmála um hetta stóra og stásiliga skip.

– Eg vil siga, at tað hevur gingið heilt óvanliga væl hjá Krúnborg í ár. Vit hava havt so gott sum fult skip seinastu tveir túrarnar. Tann fyrra túrin hevði Krúnborg 2340 tons, sum teir fingu í seks hálum og tann seinna 2504 tons.

Spurdur, hvussu tað hevur gingið at svarað hvørjum sítt við einum so stórum og dýrum skipi, síðan Krúnborg kom í fiskiskipaflotan, sigur reiðarin, at tað hevur ikki verið nakar trupulleiki, soleiðis sum gongdin higartil hevur verið.

## Nógvur svartkjaftur

Eiler Jacobsen sigur, at hóast fiskifrøðingar mæla til at halda aftur í veiðini eftir svartkjafti, vísir tað seg, at meiri og meira svartkjaftur er at fáa hvørt ár.

– Veiðan hjá Krúnborg bara økist, sigur reiðarin at enda.

Svartkjafturin er annars á veg norðureftir í føroyskan sjógv. Tróndur í Gøtu var tann fyrsti, sum kastaði í føroyskum øki í fjør; hetta var 12. apríl, og teir roknaðust beinanvegin.

# Gravgangur um partabrøv í Sparikassanum

AÐALFUNDUR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



*Marner Jacobsen, stjóri avmyndaður í gjár*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Í kvøld verður aðalfundur í Føroya Sparikassa og hetta verður allarhelst seinasti fundur hjá Føroya Sparikassa í tí líki hesin gamli peningastovnur er skipaður í dag. Aftaná aðalfundin fer helst at standa P/F aftanfyri Føroya Sparikassa, tí smápartafelag verður ongantíð talan um. Soleiðis var annars lýst, tá partafelagið var skrásett.

At áhugi er fyri at skipa Føroya Sparikassa til eitt partafelag er ongin ivi um. Tey, sum eru ábyrgdarar og hava eina ábyrgdarfæ í Sparikassanum fáa, um tey ynskja tað, peningin á hesi umgjørdan til partapening. Og sannur gravgangur hevur verið seinastu tíðina at gerast ábyrgdari í Føroya Sparikassa seinastu vikurnar.

– Í seinasta mána teknaðu yvir 300 fólk sum nýggir ábyrgdarar í Sparikassanum og bara hesa seinastu vikuna hava 700 teknað seg aftur at, so at seinasta mánaðin hevur Føroya Sparikassi fingið góðar 1000 nýggjar ábyrgdarar aftur at teimum 6266 sum vóru frammanundan. Hesir verða um teir ynskja tað partaeigarar í Sparikassanum, tá hesin er umskipaður til partafelag og vit rokna við, at hetta hendir í dag. Teir fundir, sum hava verið í umboðsráðnum seinastu tíðina, meðan vit hava arbeitt við umleggingini, hava víst, at umboðsráðið er fyri at sparikassin gerst partafelag, sigur Marner Jacobsen, annar av stjórunum í Føroya Sparikassa.

Umboðsráðið er evsti myndugleiki í Sparikassanum og tað verður hetta ráð sum mannar aðalfundin í kvøld.

Sparikassin er elsti peningastovnur í landinum. Hann varð stovnaður í 1832 sum ein peningastovnur, íð tók í móti uppspardum peningi hjá fólki. Peningurin varð settur í Kongiligahandilin og í Statsgældskassen fyri at renta. Hetta var einasta virksemi tey fyrstu árini. Síðan varð farið at læna pening móti panti í jørð. Í 1882 fór sparikassin upp í fígging av húsum í samband við at man fekk eina avtalu í lag við eina danska brunatryggingin og hetta virksemi helt fram næstu góðu 100 árini, har sparikassin hevði 1. prioritet í húsalánum. Eisini vóru kommunulán ein tíðandi táttur tey fyrstu árini.

– Kreppan broytti okkara virkisøki. Knappliga fingu bankarnir 2.7 milliárdir úr Danmark og okkurt skuldu teir gera við hendan pening, so teir fóru at heildarfíggja hús. Vit mistu virkisgrundarlag og hetta fekk okkum at royna nýggjar leiðir, vit fóru upp í vinnulívið. Tað hevur mangan verið sagt, at vágin er størri við at fíggja vinnulív enn sethús. Men kreppan vísti at bankarnir mistu nógvan pening av sethúsum, sigur Marner Jacobsen.

– Í 1994 varð sparikassalógin broytt og har vóru eisini lunnar lagdir undir, at sparikassin kundu umskipast til partafelag og tað er tað sum nú fer at henda. Sparikassin hevur umleið 800 milliónir í eginpeningi og ábyrgdarfæið var við ársbyrjan 11,6 milliónir krónur. Ábyrgdarfæið verður gjørt um til partabrøv ynskja ábyrgdarirnir tað og at stórur áhugi er fyri at gerast partaeigari í Sparikassanum er sjónligt, hyggja vit eftir teimum mongu nýggju ábyrgdarunum í Føroya Sparikassa, sum eru lagdir afturat undan aðalfundinum, sigur Marner Jacobsen, stjóri í Føroya Sparikassa.